# Vikuskifti

Nr. 105 • fríggjadagur • 2. juni 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo




*Møguliga eru øðrvísi lívtreytirnar her orsøkin til, at so nógvir føroyingar fáast við list, grunar svenska listakvinnan Ann L. Jacoby, sum í næstum hevur tvær framsýningar í Føroyum*

# Fyrsta listaframsýningin í Porkeri



*"Stormsikret hus"*



*"Uden for Porkeri"*




*Bykerne, Lofoten"*

Nú verður á fyrsta sinni høvi at fara á listaframsýning í Porkeri, har mentanardagar eru um vikuskiftið. Tað er svenska listakvinnan Ann L. Jacoby, ið sýnir fram 30 málingar, har flestu av myndevnunum eru úr Porkeri og har um leiðir

MENTAN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Síðsta summar búði og arbeiddi svenska listakvinnan Ann Lundén Jacoby í tríggjar vikur í Porkeri.

Tíðin í har gav henni íblástur til eina røð av málningum við myndevnum úr Porkeri og støðum har um leiðir, sum hon fer at sýna fram í samkomuhøllini í skúlanum í Porkeri í døgunum 3.- 4. juni.

### "Útpostar"

Ann L. Jacoby dylur ikki yvir, at hon er sera spent uppá, hvussu føroyingar fara at taka ímóti og tulka hennara málningar. Við á hesi framsýningin hevur hon eisini 10 málningar, sum hon hevur málað í Lofoten, og sum hon heldur hóska væl saman við málningunum úr Føroyum. Sjálv kennir listakvinnan tað sum, at hesir báðir "útpostarnir" hóska væl til hennara temperament og listarligu tilgongd, tí lívstreytirnar tykjast meir kargar og naknar her enn aðrastaðni.

– Sjálvandi forklárar støddin á hesum báðum samfeløgunum nógv. Men uttan iva eru hesar øðrvísi lívstreytir ein avleiðing av, at íbúgvarnir eru so tætt knýttir at og bundnir av eini skiftandi náttúru, sum modernaða menniskja ikki hevur tamarhald á. Hinvegin hevur sama náttúra eisini ótrúliga vakrar og fjøltáttaðar upplivingar at bjóða. Í mínum eygum tykist lívið á "oyggjunum" at hava eina eyka dimensión av lívsmegi, tí sansaliga og felagsskapi, sigur Ann L. Jacoby og leggur afturat, at tað er, sum um lív og deyði koma nærri hvørjum øðrum í slíkum samfeløgum á ein gevandi hátt.

– Møguliga skapa slíkar umstøður eitt annað slag av menniskjum. Og kanska er tað tí, tað eru so nógv fólk ú Føroyum, sum eldhugað fáast við tónleik, myndlist og bókmentir, grunar listakvinnan.

### Mentanardagar

Skipað verður fyri tveimum framsýningum á hesi vitjanini hjá Ann L. Jacoby í Føroyum. Tann fyrra verður í Porkeri nú í vikuskiftinum, og er hetta fyrstu ferð høvi er at síggja eina listaframsýning har í bygdini. Samstundis verður hetta eisini eitt slag av mentanarvikuskifti í bygdini, har ein av stigtkararnum, Erik Christensen, fer at vísa diasmyndir, hann sjálvur hevur tikið umframt at kirkjan og nýggja Bygdasavnið eisini eru opin. Tað er Fornminnisfelagið, sum seinnu árini hevur arbeitt við at umvæla gamla skúlan í bygdini, sum nú stendur sum eitt snotiligt Bygdasavn.

Vikuna eftir, í døgunum 9.- 15. juni, verður framsýningin hjá Ann L. Jacoby at síggja í Smiðjuni í Lítluvík.

Petur Skeel Jacobsen um vikuskiftisveðrið:

# – Gott veður á hvítusunnu



Næstu dagarnar verður veðrið gott kring alt landið – serliga í morgin, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur:

– Hitin fer at liggja millum 10-15 stig alla hvítusunnu, so møguleiki verður at hugna sær saman úti í sólini. Serliga verður veðrið gott eystanfyri, men í Havn verður tó eisini gott »Asfaltveður«, hóast onkrar løtur við mjørka og sirmi eru á skránni, sigur Petur Skeel Jacobsen og skoytir uppí, at vindin, sum var í morgun, fara vit ikki at hoyra á hvítusunnu.

**- horsdal**